LM-051/2020

Tórshavn 26.10.2020

Viðmerkingar til broytingar í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin).

Maskinmeistarafelagið heldur at tað er at fegnast um góðu fíggjarligu støðuna hjá grunninum.

Við støði í hesum taka vit undir við at inngjaldið lækkar frá 1,25% til 1% og at hámarkið fyri útgjald verður økt frá 17.500 til 18.500 kr/mdr. Tó vil felagið mæla til varsemi, serliga í hesum tíðum, hvar ið stór óvissa er á onkrum vinnuøkjum.

Vit vilja gerða vart við at tað er sera umráðandi at haldføri í skipanini verður varveitt, eftir eina slíka broyting, soleiðis at tað ikki gerðst neyðugt at fara hinvegin aftur í bræði.

Maskinmeistarafelagið tekur eisini undir við broytingini har markið fyri útgjald uppá 67 ár, verður útskift við orðingina "náddan fólkapensiónsaldur".

Eisini ásannar felagið at tað, í summum førum kann verða gagnligt at leggja nevndir saman sum tað helst er í hesum føri. Hinvegin vilja vit gerða vart við at slíkar samanleggingar skullu lýsans til fulnar, fyri at tryggja at viðkomandi nevnd, hevur førleika og umstøðir at umboða hesar grunnar ella feløg, á fullgóðan hátt.

Hóvast Maskinmeistarafelagið tekur undir við teimum broytingum sum tað her verður lagt upp til, so hevði felagið ynskt at aðrar broytingar vóru tiknar við.

Serliga hugsa vit um serskipanina fyri fiskimenn, tá ið skip teirra verður lagt vegna umvæling.

Treytirnar her um at teir ikki hava rætt til útgjald fyrenn tað eru gingnir 30 dagar og tá hava rætt til útgjald í 60 dagar, halda vit ikki er rímilig. Og tá ið man tekur ásetingina um at útgjaldið lækkar við 0,5% stigum fyri hvørjar 1.000 kr. sum inntøkan seinasta árið, fer uppum tað útgjaldshámarkið uppá 210.000 kr. Hendan mótrokningin vil hava við sær at um inntøkan seinasta árið er omanfyri 410.000 kr, so verður einki goldi út. Her er talan um ásetingar sum bert eru galdandi fyri hendan b´´olkin, og tað meta vit er órímiligt.

Maskinmeistarafelagið mælir til "karensdagarnir" verða tiknir burtur, ella í hvussu er minkaðir markant, og at ásetingin um lækkandi útgjald, verða strikaðar.

Vh. Ólavur Gunnarsson formaður í Maskinmeistarafelagnum